


Á heilsu- og umhvørvisdeildini hjá Tórshavnar kommunu verður søkt eftir dugnaligum fólki til spennandi og avbjóðandi starv, har tú serliga kemur at arbeiða við heilsu- og umhvørvismálum. Umhvørvið viðkemur okkum øllum, og her hevur tú møguleika at gera tína ávirkan galdandi saman við dugnaligum starvsfólki í umsitingini.

**Førleikakrøv**
Tann, ið sett/ur verður, skal hava útbúgving sum verkfrøðingur, byggifrøðingur, tekniskt hjálparfólk ella hava líknandi útbúgving, helst innan heilsu og umhvørvi. Ynskiligt er, at tú hevur royndir innan økið og hevur kunnleika innan almennu fyrisitingina.

**Persónligir eginleikar**
Dentur verður lagdur á, at tú:
- ert før/ur fyri at arbeiða sjálvstøðugt
- arbeiðir við nærlagni og skynsemi
- er fyrikomandi og dugnalig/ur at samstarva

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber og lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag. Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær Boða Haraldson, býarverkfrøðing, ella Janus Isfeldt, leiðara á starvsfólkadeildini, tlf. 302010.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera hjá Tórshavnar kommunu, Postboks 32, FO-110 Tórshavn, í seinasta lagi mánadagin 20. oktober 2008. Merkið umsóknina »Heilsu- og umhvørvisfólk«.

**Heilsu- og umhvørvisdeildin**
Heilsu- og umhvørvisdeildin er partur av teknisku deild í Tórshavnar kommunu.

Heilsu- og umhvørvisdeildin umsitur mál, sum sambært umhvørvislóggávuni eru løgd undir kommununa at umsita.

Tekniska deild heldur til í miðbýnum í Havn saman við byggi- og býarskipanardeildini, snarskivuni og postverkinum í gamla posthúsinum.

**Tórshavnar kommuna**




**Frá 10. oktober 2008 verða hesir takstir, og hesar treytir galdandi fyri langtíðarparkering:**

| | |
|---|---|
| 1. dag, til og við | |
| 6. dag, til og við 19. dag: | 35 kr. um dagin v/mvg |
| 20. dag og frame | |

**Upphæddin verður goldin á langtíðarparkeringsøkinum, tá bilurin verður heintaður.**

www.risin.fo

***Egin ábyrgd:***
*P/F Vága Floghavn átekur sær onga ábyrgd av óhappum, stuldri, fólkaskaða, ella skaða á akførum og aðrari útgerð.*

**Vakttelefon**
**Tel. 210875**

Sosialurin
Sosialurin i

MEGA

NÝGGJUR HANDIL
VIÐ MEGALEKRUM
UNGDÓMSKLÆÐUM
LETUR UPP Í SMS
LEYGARDAGIN KL. 10

FLEIRI MEGAGÓÐ
KLÆÐNAMERKI, SUM
LEVI'S, DIESEL, HOUND,
HUMMEL OG ONNUR